


# Klekingardepil fyri nýggjar vinnur



Val
BJØRT SAMUELSEN
Tjóðveldi

Eg stórfegnist um, at fokus er komið á íverksetan, og harvið møguleikar hjá nýggjum vinnum at spretta. Íverksetarahúsið í Klaksvík hevur skjótt eitt ár á baki og er eitt sera spennandi og neyðugt tiltak, har Klaksvíkin, sum ikki einaferð í vinnuhøpi, gongur á odda.

**Klekingardepil**
Tað er sera umráðandi at fáa konseptið við íverksetarahúsinum útbygt, so tað hjá hvørjum einasta íverksetara gerst einfalt og munandi minni møtimikið enn í dag at koma frá hugskoti til inntøkugevandi vinnu. Av hugskoti spretta hugskot, og tí skulu vit seta á stovn ein klekingardepil, ið verður ein kreativ kjarna, har skapandi sálir og heilar hittast og fáa synergieffektina av felags umhvørvinum.

Í hesum depli skal, umframt at leita sær ráðgeving um íverksetan og fígging, eisini bera til at leiga bílig høli í byrjanartíðini hjá fyritøkuni – til dømis í tvey ár. Umframt kontór kann ein slíkur bygningur rúma ymisk kreativ høli, eitt nú atelier, studio, felagshøli og café, har fólk kunnu savnast.

**Eisini úti í heimi**
Alt fleiri fyritøkum og persónum tørva professionella ráðgeving at fara út í heim – tað veri seg til Íslands, USA, Russlands, India ella aðrastaðni. Saman við SamVit eiga vit at nýta okkara sendistovur í arbeiðinum at hjálpa føroyskum fyritøkum, ið vilja á útlendska marknaðin. Klekingardepilin kann á sendistovunum hava undirstøðir, serkønar í marknaðinum í viðkomandi landi. Sjálvi hava vit - enn - einans sendistovur í Íslandi, Bruxelles, London og Keypmannahavn, men til ber at samstarva við sendistovur hjá øðrum londum – til dømis íslendskar og danskar sendistovur.

Vit hava uppfinnarar, tónleikarar, listafólk, sniðgevar, KT-snillingar v.fl. á høgum stigi. At tryggja teimum møguleikan at koma frá hugskoti til inntøkur er tað sama sum at tryggja okkara framtíð. Hetta er ein av týdningarmestu uppgávunum á vinnupolitiska økinum – ikki minni týdningarmikil enn at byggja tunlar. Tí tað er skapandi heilum og hondum, vit skulu liva av í framtíðini!

# Kann løgtingslimur keypast?



Val
HEÐIN D POULSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Tað er eingin loyna, at dýrt er at fíggja valstríð. Afturat flokkunum hava tey einstøku valevnini brúkt úr egnum lumma eftir førimuni.

Hetta fær valla verið nógv øðrvísi, og soleiðis er eisini í grannalondum okkara. Vit mugu venja okkum við, at nógvir pengar skulu brúkast uppá valstríð.

Men í Føroyum er røðanadi, at politisk valevni kunnu verða stuðlaði fíggjarliga av feløgum, felagsskapum ella einstaklingum, uttan at nakar veit tað.

Vælkent er, at politikarar senda rokning fyri vallýsingar til egið virki, eisini at summir politikarar fáa fíggjarligan styrk frá fyritøkum, teir hava eitt tilknýti til. Hvørjar eru intentiónirnar hjá hesum fyritøkum? Og í hvussu stóran mun hava tær ávirkan á rikna politikkin?

Sterk fyritøka, felagsskapur ella privatpersónur kann uttan himpr fíggja valstríðið hjá valevni, uttan at nakar veit. Enntá kann ein pengasterkur uttanfyristandandi velja at stilla upp eitt valevni við einum ávísum endamáli, fáa viðkomandi valdan á ting og síðani stýra viðkomandi.

**Keypa løgtingslim**
Sum í okkara grannalondum, mugu reglur gerast, ið týðiliga áseta krøv til upplýsing, hvaðani politiskir sponsorpengar koma. Lata vit standa til, fara fleiri pengasterkar fyritøkur, felagsskapir og einstaklingar at keypa sær umboðan inn á ting.

Vit mugu hava greiðar reglur um roknskap og upplýsing í samband við valstríð. Flokkar og valevnu mugu almannakunngera samlaðu útreiðslurnar og størru stuðlarnar.

# Aldrin áður eru so nógvar góðar hendur komnar aftrat til umsorgan



Val
HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður
Javnaðarflokkurin

Tá vit gera upp, hvussu nógv fólk eru komin aftrat til at røkja tær nógvu ymisku umsorganaruppgávurnar innan alt tað stóra almanna- og heilsuøkið, so hevur aldrin áður verið so stóru vøkstur í einum valskeiði, sum hesum.

Hetta vil eisini siga, at aldrin áður er almanna- og heilsuøkið raðfest hægri enn í hesum valskeiðið.

Allir tríggir samgonguflokkarnir eiga æruna av hesum. Men Javnaðarflokkurin hevur havt ovastu politisku ábyrgdina av almanna- og heilsuøkinum, og eg haldi ikki at tað er at siga ov nógv, at tað er eydnast væl, og at tað kann man fegnast um. Tí tað sæst skilliga aftur í politisku raðfestingini av hesum ovurstóru týdningarmiklu málunum fyri livikor og vælferð í Føroyum.

Hetta er fram um alt annað ein raðfesting av teim mest bleytu virðunum, sum tað annars er tógvið stríð at fáa neyðugar játtanir til. Men í hesum valskeiðið er tað eydnast samgonguflokkunum væl at samstarva og røkka góðum úrslitum á hesum øki.

**Fleiri hendur til umsorgan: starvsfólkavøkstur á almanna- & heilsuøkinum**

| Almanna- og heilsuøkið | Árið 2003 | Árið 2007 | Ætlan 2008 | Øking í tali 2003-08 | Øking í % 2003-08 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eldrarøktin | 533 | 720 | 755 | 222 | 42 |
| Trivnaðartænasta/serforsorg | 209 | 233 | 233 | 24 | 11 |
| Børn & ung stovnar | 86 | 111 | 111 | 26 | 30 |
| Stuðlar fyri vaksin | 40 | 48 | 60 | 20 | 49 |
| Barnatænastan | 22 | 25 | 25 | 3 | 14 |
| Sjúkrahúsini | 877 | 924 | 924 | 47 | 5 |
| Deildin fyri sinnisveik | 20 | 45 | 45 | 25 | 123 |
| Apoteksverkið | 70 | 80 | 86 | 16 | 23 |
| Fyrisitingarligir stovnar* | 134 | 131 | 131 | -3 | -2 |
| Tilsamans | 1990 | 2315 | 2368 | 378 | 19 |

**Almanna- og heilsuøkið*

**Fyrisitingarligar stovnar: Almanna- og heilsumálaráðið, Almannastovan og Nærverksskrivstovan. Ætlan 2008 er sum 2007, við bundnum framskrivingum (at t.d. nýggj røktarheim telja fyri fult ár) Viðv. Apoteksverkinum er nýtt apotek komið aftrat í Eysturoynni.*

# Enn er óvist hvør ið myrdi svenskan universitetslektara

**MORÐ**
*Heri Eysturlíð*

Mikukvøldið var minningarhald fleiristaðni í Svøríki fyri Fuat Deniz, tí svenska universitetslektara, ið varð myrdur á arbeiðsplássi sínum í Örebro í farnu viku. Fitt av fólki var samankomið, serliga í Örebro, har Fuat Deniz búði og arbeiddi, og har røddi m. o. Andreas Carlgren, umhvørvismálaráðharri.

Í Stockholm røddu m.o. Lars Ohly, leiðari fyri Vänsterpartiet, og einkjan eftir Fuat Deniz, Rúna Deniz í Baianstovu, ið er ættað úr Havn. Hon las brot úr seinastu bókini hjá Fuat Deniz, ið gjølla viðger ta demokratisku skipanina, og Rúna spurdi m. a. í síni røðu, um nakar kann hava uppfatað Fuat Deniz'sa granskaravirksemi um minnilutar, nationalstatin, hugsunnarfrælsi o. a. sum eina so stóra hóttan, at tey vildu honum eftir lívinum.

Fuat Deniz var av armenskum uppruna og víðakendur úti í heimi fyri sína umfatandi gransking av armenskari søgu og viðurskiftunum hjá armenum. Henda gransking hevur mangan fingið ilt í víðgongdar turkiskar nationalistar, men enn er ov tíðliga at siga, um morðið var politiskt, ella um drápsmaðurin var ein ørvitisfiskur.



Svenska løgreglan hevur fingið hópin av upplýsingum, ið kunnu hava samband við morðið. Hetta er sera rúgvismikið tilfar, og enn vil løgreglan einki ítøkiligt siga hesum viðvíkjandi.